Vikuskiftis Sosialurin


# Gunnar Justinussen eigur nú P/F Wenzel

**Føroyska Ford-umboðið er nú selt. Gunnar Justinussen, sum eigur og rekur Dekk-sentrið, hevur keypt fyritøkuna**

BILASØLA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hetta fingu starvsfólkini hjá P/F Wenzel fingið at vita á starvsfólkafundi í gjár. Við hesum fara Óla Svend Nolsøe og Peter S. Petersen úr fyritøkuni, har teir annars hava starvast í drúgvt áramál.

Nýggja leiðslan hjá P/F Wenzel verður sett saman av Jógvan Højgaard og Oddmar Ørvarodd, men annars verður talan ikki um tær heilt stóru broytingarnar her og nú, sigur Gunnar Justinussen. Soleiðis verður talan ikki nakra ávirkan fyri starvsfólkini annars hjá fyritøkuni.

Gunnar Justinussen sigur, at partarnir eru samdir um ikki at upplýsa prísin fyri handilin.

Við hesum fer Ford umboðið úr familjuni hjá Wenzel Petersesen, har tað hevur verið seinastu 84 árini - ella síðani fyrsti bilur kom til Føroya tann 6. mai í 1922.

Óla Svenn Nolsøe og Peder S. Petersen eru abbasynir hjá Wenzel Petersen.


Starvslýsing

## Røktarstarvsfólk til Røktarheimið á Mørkini, Streymnes

Heimið lat upp í maj 2006 við 16 røktarheimsplássum, og í løtuni eru vit í ferð við at lata tey síðstu plássini upp. Tí søkja vit eftir røktarstarvsfólki at arbeiða 0,7 tíð í blandaðum vaktum.

**Vit søkja eftir fólki**
- við røktarfakligligari útbúgving og royndum
- sum hava hug og hegni at samstarva
  við ymiskar fakbólkar
- sum hava áhuga fyri at starvast innan eldrarøkt
- sum kenna gleði við at vera saman við eldri fólki

Onnur áhugað, ið ikki hava røktarfakliga útbúgving, eru eisini vælkomin at søkja eitt tíðaravmarkað starv.

**Vit bjóða**
- góðar arbeiðsumstøður í nýggjum heimi
- eitt áhugavert og mennandi starv, har arbeitt verður tvørfakligt
- eitt starv við nógvum avbjóðingum
- eitt starv í einum øki í støðugari menning

**Setan, umsókn og freist**
Størvini verða sett 1. november 2006 ella skjótast tilber.
Lønin verður ásett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag.

Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er fyribils Røktarheimið á Mørkini.

Vilt tú vita meira um størvini, ert tú vælkomin at venda tær til deildarleiðaran á Mørkini á telefon 505440.

Send eina umsókn við prógvi, autorisatión og møguligum viðmælum til

Røktarheimið á Mørkini
435 Streymnes
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari

**Umsóknarfreistin** er 23. oktober 2006.

*Røktarheimið á Mørkini er ein samskipaður partur av Heimatænastuni Vágar/ Norðstreymoy. Á Røktarheiminum á Mørkini eru 32 búpláss býtt út á 4 eindir við 8 búplássum á hvørjari eind. Til hvørja eind er felags køkur og stova. Búeindirnar eru sambundar av einum meginbygningi, ið umfatar meginkøkin, hølir til ergo- og fysioterapi og sal til felagstiltøk á heiminum. Aðalsetningurin fyri heimið er at skapa eitt so heimligt og livandi umhvørvi sum gjørligt.*

## Sjúkrarøktarfrøðingur til Heimatænastuna Vágar/Norðurstreymoy

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingi at arbeiða 20 tímar um vikuna í skiftandi dag- og kvøldvaktum.

Arbeiðið umfatar røkt og umsorgan til heimabúgvandi borgarar og til búfólkini á Eldrasambýlinum í Vestmanna. Arbeitt verður í tøttum samstarvið við aðrar fakbólkar innan Heimatænastuna.

**Førleiki**
- Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Fakligan áhuga fyri primera økinum
- Góð samstarvs- og samskiftisevni
- Fleksibilitet
- Teldukunnleiki á brúkarastøði er ynskiligur

**Setan, umsókn og freist**
Starvið verður sett 1. november 2006 ella skjótast tilber.
Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar.
Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er fyribils Heimatænastan í Vágum, Vestmanna og í Kvívíkar Kommunu.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til økisleiðaran ella varaleiðaran á tlf. 333249/422570.

Send eina umsókn við prógvi, autorisatión og møguligum viðmælum til

Heimatænastan
Vágar/Norðurstreymoy
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari
370 Miðvágur

**Umsóknarfreistin** er 23. oktober 2006.

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumála- ráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

sansir.fo

www.naerverk.fo


# Bilur endaði á Hvalvíksoyruni




*Hesin bilurin fór sær ein túr oman á Hvalvíksoyruna tíðliga hósmorgunin. Løgreglan veit ikki við vissu, um hálka var orsøkin til óhappið*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

**Petur Skeel Jacobsen, veðurmaður, sigur, at jørðin hesa tíðina av árinum er kaldari enn luftin um næturnar, og tí er skilagott at ansa væl eftir møguligari hálku, tá ið klárt og kalt er í veðrinum**

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Klokkan 07.40 hósmorgunin fekk løgreglan í Havn fráboðan um, at hesin bilurin var farin út av landsvegnum millum Hvalvík og Streymnes. Bilurin, sum var á veg norðureftir, endaði niðri á Hvalvíksoyruni, tey rópa.

Ein maður var í bilinum, og hann fekk ongan skaða, hóast bilurin eftir øllum at døma bóltaði runt og endaði á liðini.

Løgreglan sigur, at óhappið hendi í samband við eina yvirháling, men førarin hevur eisini nevnt okkurt um hálku.

- Vit vita tó ikki, um møgulig hálka á landsvegnum var orsøkin til óhappið í morgun, sigur løgreglan.

Tað var stilt og klárt í veðrinum hósmorgunin, og onkustaðni varnaðust fólk, at frost var at síggja í bønum.

Onkur bilrútur var eisini frystur, tá ið fólk fóru í bilin stundisliga.

Á politistøðini í Havn siga tey, at tey annars onga fráboðan fingu um ólag á ferðsluni hendan morgunin orsakað av møguligari hálku á vegunum.

Sosialurin vendi sær eisini til politistøðina í Runavík hósmorgunin, og har høvdu tey heldur einki hoyrt um trupulleikar í ferðsluni.

Nú tað er vorðið kaldari í veðrinum, er neyðugt, at fólk ansa sær í ferðsluni.

Er morgunin klárur, er ikki vist, at vegirnir ikki eru hálir, hóast hitamátarin á bilinum sigur, at einki frost er.

Sama er um kvøldarnar.

Petur Skeel Jacobsen, veðurmaður, sigur, at jørðin hesa tíðina av árinum er kaldari enn luftin um næturnar, og tí er skilagott at ansa væl eftir.